# TILTØK

**Havnar kirkja**
Kl. 15.00 Prestavígsla, Hans J. Joensen, biskupur prestvígur Mariannu Telling.

**»Tíð til Gud«**
Úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Øivind Svensen frá Youth With Á Mission talar. Aftaná er drekkamuður. Verið hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 barnabíbiliutími og bíbliugransking. Evni: Søk Harran. Kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti har John Petersen talar. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 20.00 Møti í missiónshúsinum í Kollafirði.
Sunnudagin kl. 11.00 og 18.00 Møti har major Turid og Knut Gamst tala og leiða.
Sunnudagsskúli kl. 14.00, kl. 17.30 Bøn.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.
Mikudagin kl. 15.00 Bøn.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta, kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Petur Skeel Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, kl. 21.00 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16.00 Samkomufundur.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20.00 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagsin kl. 11.00 Hámessa v/ P. Michal Bienkowski í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Hósdagin kl. 20.00 verður Taizékvøld í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Leygardagin 3. november kl. 14.00-19.00 verður tiltakið »List og Bøn« hildið í Mariukirkjuni.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Annu Petru og Karlon Winther, Velbastaðvegur 48, Havn.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti, Vagn í Geil talar. Øll eru vælkomin.

**Kvívík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 19.00 í Glæmuni. Mourits talar og Streingjakórið í Havn syngur. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20.00 Húsmøti hjá Jóhan Hendrik og Eyðbjørg.
Tlf. andaktin 424741.

**Unitum, Kollafjørður**
Sunnudagin kl. 18.30-21.15 Alphaskeið í Unitum í Kollafirði.

**Kollafjørður**
Frelsunarherurin hevur møti í Missiónshúsinum leygarkvøldið kl. 20.00.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnudagin kl. 18.30-21.15 Alphaskeið í Unitum í Kollafirði.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.00-24.00 Bønarkvøld.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Malmberg Olsen.

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará v/ Osbjørn Joensen, Skálafirði, høvi verður at fáa forbøn.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19.00 í Syðrugøtu hjá Mikkalinu Magnussen.

**B68 húsið á Svangaskarði**
Evangel. møti verður leygarkvøldið og sunnukvøldið kl. 20.00 í B68 húsinum.
Leygarkvøldið talar David Bech. Luttøka úr Skopun, Herman og Gigga syngja.

**Soli Deo Gloria**
Týskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Mikumorgunin kl. 6.00 Bøn.
Kl. 20.00 Fyrilestur fyri pør v/ H. E. Hammer.
Leygarkvøldið kl. 19.00 Alpha-skeið (13-17 ár), kl. 20.30 Opið hús v/ Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bíbliutími/Bønarmøti.

**Lívsins Orð**
Í dag kl. 17.15 verður barnamøti.
Sunnudagin kl. 17.00 verður familjumøti.
Mánadagin kl. 17.00 Liljurnar og kl. 20.30 verður Ungdómsbólkurin.

**Missiónsvika í KFUM & K í Klaksvík**
Møguleiki er at keypa bøkur o.a. *Barnaansing* verður øll kvøldini. *Bønarløta* er hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møti. Frá hóskvøldinum verður boðið til kaffi aftaná møti. Boðið verður til *samtalu og/ella forbøn* til tann, sum hevur tørv á tí. Ynskja tygum *bil til møti*, eru tit vælkomin at ringja á tlf. 457425 ella 257310 frá kl. 18.45.
*Fríggjadagin* kl. 19.30 talar Torleif Johannesen, Effata syngur.
*Leygardagin* kl. 10.00 Kaffi, te og rundstykkir. Bíbliutími v/ Ásbjørn Jacobsen. Evni: Tað heilaga samfelagið.
Kl. 19.30 talar Regin Høgnesen, Streingjakórið í húsinum syngur.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta við altargongd v/ Niels Paula Danielsen, kl. 14.00 Familjumøti við heimligum kreftum, kl. 18.00 Regin Høgnesen talar, Streingjakórið í Fuglafirði syngur.
Innsavnan til Heimamissiónina. Kl. 21.00 Eftirmøti við sangi og vitnisburði.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21.00 er Caféin opin og vit hava vitjan úr Klaksvík. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Mánakvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00 í Samvirkinum í Porkeri við luttøku úr Klaksvík. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna konsert í kirkjuni.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Árna Kjærbæk og Eivind Bech. Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við *Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 311391/0045 22408269*.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 29. okt.:*
kl. 10.00-10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15: Ítriv í kjallaranum
kl. 14.00-18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudagin og fríggjadagin tlf. 316491
*Týsdagin 30. okt.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka
kl. 10.00–11: Sangur - Jóhann Restorff Jacobsen
**Øll eru hjartaliga vælkomin**
kl. 15.00: Frásøgn úr Norra – Edith í Jákupstovu
*Mikudagin 31. okt.:*
kl. 10.00–12.00: Fyrireiking til døgurða
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00: Túrur
*Hósdagin 1. nov.:*
kl. 10.30–11.00: Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 14.00–17.00: Telduprát - Brandur Petersen
*Fríggjadagin 2. nov.:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð – Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Al-anon**
hevur fundir hvørt mánakvøld kl. 20.30 í gomlu læknahúsunum á Tvøroyri.

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Kristnastova**
*Birmavej 36, København S,*
tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt møti í Álborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.




**Leikhúsið Gríma**

sýnir leikin

**Fótur í hosu**

eftir Súsonnu & Hans Tórgarð

leikstjórn Hans Tórgarð

á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **Fríggjakvøldið** | **2.11.2001 kl. 20.00** |
| **Leygarkvøldið** | **3.11.2001 kl. 18.00** |
| **Sunnukvøldið** | **4.11.2001 kl. 18.00** |
| **mikukvøldið** | **7.11.2001 kl. 20.00** |

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.



**Vetrarferðaætlan**

Útgávan av nýggju ferðaætlanini hjá Strandferðsluni er útsett í 2 mánaðir.

Hósdagin 1 . november verður tí farið yvir til vetrarferðaætlanina í verandi ferðaætlan.

Víst verður til heimasíðuna www.ssl.fo og tekstvarpið

STRANDFARASKIP LANDSINS







# PhD-lestrarstarv innan havfrøði

**á Náttúruvísindadeildini, Fróðskaparsetur Føroya til verkætlanina**

## Operativt aldumodell fyri Føroya økið

Á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya verður eitt 3 ára PhD-lestrarstarv tøkt frá 01.01.2002. Tað er fíggjað av Statoil-bólkinum, ið er samansettur av oljufeløgunum Statoil, Phillips, Enterprise og Veba. Verkætlanin er komin lag, tí alduviðuskiftini hava avgerandi ávirkan á alt virki á sjónum, og Náttúruvísindadeildin hevur sett sær sum mál at menna hetta fakøkið.

Tann, sum settur verður, skal saman við vísindastarvsliðinum á Náttúruvísindadeildini menna eitt numeriskt operativt aldumodell fyri Føroya økið, umframt at royna at lýsa serlig alduviðurskifti á Føroya leiðunum.

Í PhD-verkætlanini skal tann, ið settur verður, taka skeið og luttaka á ráðstevnum og verkstovum. Í sambandi við verkætlanina má roknast við styttri ella longri tíðarskeiðum á læru- ella granskingarstovnum uttanlands. Tað verður væntað at viðkomandi, sum settur verður, er førur/før fyri at verja arbeiði sítt fyri Phd-gradina innan fyri tíðarrammuna uppá 3 ár.

Umsøkjara skulu hava prógv sum cand. scient. ella sivilverkfrøðingur innan viðkomandi fakøkið (t.d. hav-, stødd-, jarðalis- ella alisfrøði). Tað er ynskiligt, at umsøkjarin hevur hollan kunnleika til telduforritan.

Tey, ið eru ávegis at gera kandidatuppgávu, eru eisini vælkomin at søkja, men tey skulu hava lokið prógv, áðrenn tey kunnu byrja.

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu millum Magistarafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), lista við vísindaverkum og møguligum vísindagreinum skulu sendast til

**Fróðskaparsetur Føroya**
J. C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO 110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 15.11.2001.

Meira fæst at vita um verkætlanina á heimasíðuni: http://www.sleipnir.fo/havfrodi ella við at venda sær til Knud Simonsen, lektara, á teldupostadressuni knuds@setur.fo ella tlf. 315306.

Á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetrið Føroya eru íalt 7 vísindastarvsfólk innan stødd-, alis-, evna-, lív-, hav-, jarðalis- og ravmagnsverkfrøði. Harumframt eru tvey starvstovufólk á starvsstovuni og eitt skrivstovufólk í umsitingini. Í løtuni eru tríggjar Phd-verkætlanir í gongd á NVD, og eru tær innan seismiskar signalviðgerðarhættir, mekaniskar eginleikar hjá basalti og simulering av oljureservoirum. NVD veitir Bachelor of Science (BS) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, teldufrøði og jarðalisfrøði. Undirvísingin verður veitt av starvsliðinum á NVD og av uml. 30 uttanseturs undirvísarunum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni



**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**
FO-370 Miðvágur
Tlf. 332600 · Fax 333604

# Ellis- & Avlamisheimið í Vágum

Vit hava brúk fyri trimum starvsfólkum uppá umleið hálva tíð til búfólkarøktina. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

| | |
|---|---|
| Starv I | Sjúkrasystir/heilsuatstøðing/sjúkrahjálpara<br>- henda vaktin er mest á kvøldi. |
| Starv II | Heilsuatstøðing/sjúkrahjálpara<br>- henda vaktin er mest um dagin. |
| Starv III | Heilsuatstøðing/sjúkrahjálpara<br>- henda vaktin er nær um líka nógv á degi og á kvøldi. |

Vit hava fyri nøkrum árum síðan býtt húsið upp í tvær deildir: H-deildin og Húsið Annars. Starv III er á H-deildini, ið er demens deild burturav, hini bæði størvini Húsið Annars.

Vilt tú vita meira um størvini, og hvat arbeiðið snýr seg um, er tú vælkomin at vitja inn á gólvið.

Umsókn við neyðugum prógvum v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 15. nov. 2001. Setanartreytir sambært sáttmála ímillum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið. Byrjað verður í størvunum eftir avtalu.


**Ortopædiskur skómakari & bandagistur**

frá SAHWA verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 27. og 28. nov. 2001, og á Landssjúkrahúsinum 29. nov. 2001.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 455463, týsdag og mikudag kl. 10–12, og í seinasta lagi mikudagin 21. nov.



